

## Íslendska skrædlið rakti víða

Fíggjarkreppan í Íslandi vísti, hvussu samantvinnaður altjóða fíggjarheimurin er, tí hóast teir íslendsku bankarnir vóru smáir í altjóða høpi, ávirkaði kreppa teirra allan heimin. Sjálvt í Taiwan kostaði íslendska bankafallið pengar, skrivar Morgunblaðið. Sagt verður, at taiwanski fíggingarstovnurin Mega Financial misti 47 milliónir dollarar, tá íslendsku bankarnir hoknaðu. Hetta er tó lítið samanborið við tað, sum Mega Financial hevur mist av amerikonsku bankakreppuni. Tann missurin er níggju milliardir dollarar, skrivar Reuters.

## Arbeiðsloysið veksur í OECD-londunum

Í novembur var arbeiðsloysið 6,56 prosent, sum var 0,8 prosentstig meiri enn í sama mánaði í 2007. Í evrulondunum vaks arbeiðsloysið í sama tíðarskeiði 0,6 prosentstig og var 7,8 prosent í november. Í USA var tað 7,2 prosent, men her var vøksturin nógv størri enn í evrulondunum ella 2,3 prosentstig. Frægastu tølini eru úr Japan. Har var arbeiðsloysið 4,0 prosent í november, sum var 0,3 prosentstig meiri enn árið frammanundan, skrivar NTB.

# Nú fær Norröna eisini stabilitet

**Smyril Line hevur leingi havt trupulleikar við stabilitetinum. Herfyri bleiv tann fíggjarligi stabiliteturin fingin upp á pláss, og nú verður Norrøna eisini stabiliserað**

SMYRIL LINE
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Smyril Line hevur leingi havt trupulleikar við stabilitetinum. Herfyri kom tað almenna upp í felagið sum fíggjarligur stabilisatorur. Góðar 30 milliónir krónur í hvørt borðið skuldu tryggja reiðarínum fíggjarligan stabilitet frameftir.

Felagið hevur eisini havt trupulleikar við stabilitetinum á sjónum, og stundum hevur Norrøna siglt í mánaðir við svikaligum stabilisatori. Men nú verður stabiliteturin eisini tryggjaður á sjónum. Smár 10 milliónir krónur í hvørt borðið skulu tryggja skipinum stabilitet.

Síðani 4. januar hevur Norrøna staðið í dokkini hjá Buhm & Voss í Hamburg. Høvuðsørindini eru at skifta stabilisatorarnar út. Ístaðin fyri teir gomlu 12 fermetrar stórur stabilisatorarnar eru tveir 15 fermetrar stórir settir í skipið, og hóast munurin ikki ljóðar av nógvum, gera teir tríggir fermetrarnir góðan mun, sigur Pauli Joensen, sum sjálvur annar er farin úr Jónas Broncksgøtu til Hamburg at fylgja við arbeiðinum har.

### Sama sum Mærsk

Teir upprunaligu stabilisatorarnir á Norrønu vístu seg ikki at halda. Men vit kundu sagt hesa somu søguna um fleiri onnur stór skip, sum hava havt sama trupulleika.

Tvær ferðir hevur Norrøna verið í dokk fyri at umvæla stabilisatorarnar, men báðar ferðirnar eru teir farnir aftur.

Seinast var tann tiltikna illveðurstúrin úr Bergen til Føroya tann 11. november í 2007, tá skipið brádliga kom í rættiliga ringan sjógv. Tá stóð ov nógv á stabilisatorunum, og endin varð, at tann í stýriborðssíðu fór. Í februar í fjør var skipið í dokk og fekk stabilisatorarnar umvældar, og síðani hava báðir verið virknir.

Men nú hevur reiðaríið valt at binda um heilan fingur og at seta nýggjar stabilisatorar í skipið. Hesir eru av slagnum Sperry Marine og eru gjørdir í Japan, og á Smyril Line halda tey seg hava funnið ta røttu loysnina.

– Fleiri stór skip hjá eitt nú Mærsk brúka hesar stabilisatorarnar, og teir hava víst seg at rigga væl, sigur Pauli Joensen.

Men góðska kostar peng-



*Húsin við stabilisatorinum vigar 85 tons*